# 913 fólk arbeiðsleys í juni

Arbeiðsloysið í Føroyum er ikki longur vaksandi. Seinasta uppgerðin hjá Arbeiðsloysisskipanini vísir, at tað fyrst í juni mánaði vóru 913 arbeiðsleys í Føroyum. Hetta er ein fleirfalding samanborið við sama tíðarskeið undanfarna ár, tá talið var 272 arbeiðsleys, men minni enn undanfarnu mánaðirnar, tá talið var uppi á 960. Men samanborið við undanfarin ár, eru alsamt fleiri menn vorðnir arbeiðsleysir. Síðani ár 2000 hava fleiri kvinnur verið arbeiðsleysar enn menn. Men nú er vent í holuni. Í juni 2009 vóru 528 menn og 385 kvinnur arbeiðsleysar, samanborið við 102 og 170 í juni 2008. Tað var í januar mánaði, at tað vendi í holuni. Hetta svarar til eitt kynsbýti á 58 prosent menn og 42 prosent kvinnur. Eisini eru broytingar í aldursbýtinum á teimum arbeiðsleysi,og eru tað alsamt fleiri ung millum 20 og 29 ár, ið eru vorðin arbeiðsleys, nevniliga 25 prosent av teimum arbeiðstøku. Hetta er nú tann størsti bólkurin av arbeiðsleysum. Áðrenn var tað tey millum 60 og 67, ið var størsti bólkurin, 31 prosent, men eru hesi nú bert 17 prosent av teimum arbeiðstøku.



# Fer at halda føðingardag við



**9 ára gamla Karita Maria úr Hoyvík fær ein heldur øðrvísi føðingardag, tá hon í morgin fyllir runt fyri fyrstu ferð. Hon sleppur nevniliga at hátíðarhalda dagin í Skotlandi saman við bretsku drotningini Elizabeth II**

FØÐINGARDAGUR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*
*myndir: Jens Kristian Vang*

Tað munnu vera tey fæstu fólkini í heiminum, ið nakrantíð sleppa at heilsa upp á bretsku drotningina, Queen Elizabeth II. Uppaftur færri munnu tey vera, sum nakrantíð hava hátíðarhildið ein føðingardag saman við henni. Í morgin kann 9 ára gamla Karita Maria úr Hoyvík tó teljast millum hesi hepnu.

Orsøkin er at hon er fødd á einum serligum degi í grannatjóð okkara fyri sunnan, Skotlandi, nevniliga tann 1. Juli 1999. Henda dagin varð skotska parlamentið endurreist, eftir at tað hevði verið niðurlagt síðan 1707, ella í samfull 292 ár. Hetta verður mett sum ein tann størsti søguligi dagurin í nýggjari tíð í Skotlandi, og er at meta sum ólavsøka hjá føroyingum.

Hesin dagur var hátíðardagur í øllum tí bretska kongaríkinum, og nógv var gjørt burturúr. Eitt nú fingu øll 163 børnini, ið vóru fødd henda dagin, eina serliga kongaliga gullmynt frá drotningini av bretska ríkinum, Queen Elizabeth II. Millum hesi børnini var Karita Maria Zachariassen, ið er dóttir Unn og Jógvan Zachariassen í Hoyvík.

## Vistu av ongum

Unn og Jógvan vóru frá 1997 til 2000 búsitandi í Skotlandi, har tey bæði undirvístu á Tilsley College í Motherwell. Tó var Unn heimagangandi ein stóran part av tíðini, tá hon jú var við barn. Dagurin upprann so, og tann 1 juli 1999 áttu tey Karitu Mariu. Hesin dagur mundi vera sum flest allir aðrir dagar, undantikið at skotska parlamentið varð endurreist henda dagin.

Hóast fólk søgdu við tey, at tað var stuttligt at tey høvdu átt sama dag, sum parlamentið varð endurstovnað, hugsaðu tey ikki stórvegis meira um tað, enn at tað var ein stuttlig samanrenning.

Stutta tíð eftir føðingina fingu tey tó hesa serligu gullmynt, ið tað bert eru 162 aðrar makan til, handaða til varðveitslu vegna Karitu Mariu til hon verður myndug.

## Fekk teldubræv úr Skotlandi

Í morgin eru 10 ár síðan skotska parlamentið varð endurreist, og hetta verður hátíðarhildið við stíli. Fyrireikingarnar fóru í gongd fyri lítlum ári síðani, og var ynskið at øll børnini, sokallaðu »1 july babies«, skuldu luttaka.

Men 10 ár er long tíð, og fleiri av teimum eru ikki longur búsitandi í Skotlandi. Tí hevur stór orka verið løgd í at fáa samband við

